

# Kjalnesbúðin snarar lykilin um

Kjalnesbúðin í Kollafirði verður ikki leingi opin aftrat, kanska bara hesa vikuna. Gitta Hansen, sum hevur rikið handilin seinastu árini, sigur, at nú verður vøran, sum eftir er, seld út – og alla hesa vikuna fyri minus 30%, og síðan verður handilin stongdur.

- Vit hava avgjørt at gevast at handla, og vit hava eisini avgjørt at selja húsini, sum mamma mín, Jofrida Madsen, eigur.

Gitta hevur fingið arbeiði sum bussførari á leiðini millum Kaldbak og Havnina.

- Hetta verða langir dagar við fríløtum ímillum, so eg dugi ikki at siga, hvussu hetta fer at rigga. Men eg fari at royna, sigur hon.

Kjalnesbúðin hevur sín uppruna afturi í fimtiárunum.

- Tað var mammubeiggi mín, Jens Joensen, sum byrjaði Kjalnesbúðina norðuri á Gørðum, tey rópa.

Gitta sigur, at pápi hennara, Niels Madsen, yvirtók handilin eftir Jens og flutti hann seinni í egnan kjallara.

- Tá ið pápi mín doyði í 1988, tók eg yvir og havi soleiðis rikið Kjalnesbúðina í kjallaranum hjá mammu míni. Nú lata vit so handilin aftur og fara at selja húsini, sigur Gitta Hansen.

**-vilmund.**



*Hóast atfinningar, so heldur Jákup á Dul framvegis, at talan er um skilagott hugskot, sum spakuliga er í ferð við at gerast veruleiki*

Jákup á Dul Jacobsen:

# Vit keypa jørðina ráa

**Røddir eru frammi um, at jørð verður seld ov ódýr í Havn og Stóratjørn verður nevnd. Jákup á Dul Jacobsen heldur t.d. vera av stórum týdningi at nevna, at talan er um jørð, ið ikki er gjørd byggibúgvin**

JØRÐ OG STÓRATJØRN
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Kári á Rógvi, løgfrøðingur og formaður í Óðalsfelagnum, nevnir í grein, at jørð í Havn og í miðstaðarøkinum verður seld ódýr, og hann nevnir í hesum sambandi ætlanina við Stórutjørn.

Vit hava biðið Jákup á Dul Jacobsen, stigtakara til Stórutjøn verkætlanina, um eina viðmerking.

Jákup á Dul Jacobsen metir, at nakrar síður av hesi søk so avgjørt eiga at havast í huga.

- Fyri tað fyrsta fara eini tveyhundaðtúsund fermetrar burturav til golfvøll. Og til eina høll til ítrótt fara fleiri túsnund fermetrar burturav, sigur Jákup á Dul, sum tó eisini hevur annað, ið hann fegin vil undirstrika.

## Rátt

- Vit keypa jørðina ráa. Tað er rá jørð, ið verður seld okkum, har tað annars er vanilgt, at talan er um jørð, ið er gjørd byggibúgvin, men her er ongin kloakk og ongir vegir. Slíkt kostar at gera, men vit keypa jørð, ið ikki er byggibúgvin, og tað er eisni vert at hava í huga, sigur Jákup á Dul Jacobsen.

Hann nevnir eisni til sammetingar, at nakað tað sama er gjørt í Reykjavík.

- Vit høvdu eina hugmynd og fóru til myndugleikarnar í Reykjavík. Her var talan um eina hugmynd, ið vit høvdu goldið einar 10 milliónir fyri at menna, vísur hann á.

## Hví ikki útjaðarin?

Men í hesum kjakinum ber eisini til at spyrja Jákup á Dul Jacobsen, hví hann ikki ístaðin er við til at menna útjaðaran, har hann óivað eisini hevði fingið góðar sømdir, og harafurat eisini stuðlaði orðaða útjaðarapolitikkinum?

- Tað er tað við slíkum ætlanum, sum Stórutjørn, at hetta má hanga saman figgjarliga. Til dømis eitt vatnland. Har má ein hava allar Føroyar við, annars ber tað seg ikki. Við góða sambandinum í Føroyum í dag, so hava 90% av føroyingum ein hálvan tíma til Havnar. Tað er líka Suðuroyggin og onkur afturat, ið ikki fæst við, sigur Jákup á Dul.

- Fólk koma, har fólk eru, og har menning er. Neyðugt er eisni at hava ein miðdepil, ein kjarna, og um Havnin blómar, so blóma bygdirnar eisini. Í Hvussu er tær, ið eru á leiðini við Havnina, vísur hann á.

## Gera klárt til Stórutjørn

Um sjálva ætlanina Stóratjørn sigur Jákup á Dul Jacobsen, at nú er komið so mikið langt, at klárt er at tekna.

- Jú, vit gera okkum klár at fara í gongd, sigur Jákup.

Hann sigur, at nógvir fyrispurningar hava verið og tá hann verður spurdur, um hvør tað er, ið spyr seg fyri, so sigur hann, at tað er mest fólk, ið vilja gera okkurt á økinum, hava virksemi ella hava eina hugmynd um okkurt, ið vantar á økinum.

Men hvussu viðvíkjandi íbúgvum?

- Ja, har eru tað kanska fleiri eldri fólk, enn eg havði væntað. Men í Íslandi er eisini vanligt, at tey eldru selja húsini og havan rundanum, og nýta peningin øðrvísi, t.d. ferðast tey meira. Men eg hugsi mær, at talan verður um eitt bland av eldri fólki og barnafamiljum, og tí er eisini umráðandi við tilboðunum, so sum høll til ymisk ítróttartilboð, sigur Jákup á Dul Jacobsen.

# Toskur er ein útbrótari

**Alitoskur hevur hvassar tenn, og hann vil fegin ganga egnar leiðir. Tí brýtur hann út 10 ferðir so oftani sum laksur í norskum alibrúkum. Hetta er ein avbjóðing fyri toskaalarar.**

ALING
*Hilmar Simonsen*
*hilmars@setur.fo*

Toskur leitar út heldur enn at leita saman. Øvut er við laksi, sum hevur lyndi til at leita saman heldur enn út. Tað hava norskir alarar noyðst at sanna, har lutfalsliga 10 ferðir so nógvir toskar sum laksar rýma úr alinótum.

Toskurin slítur og gnagar hol á nótina og sleppur sær út, um nótin er gjørd burtur úr sama tilfari sum laksanótirnar stendur millum annað at lesa á www.nvd.fo

Norski granskingarstovnurin Sintef hevur samanfatað royndirnar hjá 18 toskaalarum í Noregi. Hesir stóðu fyri 89 av umleið 200 toskaliloyvum, sum vóru í rakstri í 2004. Teir vísa serliga á trupulleikan, at toskur gnagar nótina, serliga har, sum nótin er seymað, bøtt ella leysir endar stinga fram. Dømi eru um, at har bert ein meski er farin, hevur toskurin víðkað um holið.

### Alitoskur hvassar tenn

Tað tykist sum, at tað serliga er tann minni fiskurin, sum ger seg inn á nótina. Hetta kann vera tí, at teir ikki standa seg í kappingini við størru felagarnar um fóðrið, og tí mælir Sintef alarum til at støddarskiljajavnan. Gróður á nótini tykist eisini at draga toskin til sín.

Í mun til laks, sum vanliga tekur fóður úr sjónum, so er atferðin hjá toski at leita eftur mati niðri við botnin. Út frá hesum ber til at skilja, hví toskur í størri mun amast upp í nótina.

Tenninar hjá toski eru bendar afturá fyri at halda veiðuni, meðan hann svølgir. Tá ið hann kemur at einum neti, koma tennirnar ímillum trevjurnar í netabandinum, og skrykkir hann seg tá leysan. Soleiðis kann ein endi trevsast upp. Haraftrat kemur, at tenninar hjá alitoski eru hvassari enn hjá villum fiski. Í náttúruni er føðin partvíst skeljadjór, umframt at toskurin ofta fær sand og smágrót í kjaftin, tá hann grópar niðri á botninum. Hetta slítur tennirnar.

Soleiðis sum aliringar eru í dag og við vanligum alifóðri er eingin slík 'tannrøkt' hjá toski skrivar www.nvd.fo

